# Bønar- og tíðindaskriv frá Halli, Shino, Kano og Nanu Mortensen

**Aftur til Nigeria**

Kæru náðisystkin har heima!

Sum tit ivaleyst flestøll vita, so hava vit verið í Japan í heyst. Tann 3. oktober átti Shino aðru dóttur okkara. Hon eitur Nana. Tíðin í Japan var góð, og skjótt var at venja seg við allar hentleikarnar. Tann 14. januar fóru vit so ta longu leið úr Atsugi til Ankpa.

Vit eru glað fyri at vera aftur her og at fara aftur undir arbeiðið. Vit vóru eitt sindur ørkymlað at fara frá kalda japanska vetrinum til turru og heitu árstíðina í Nigeria. Men tað hevur gingið betur, enn vit høvdu væntað, at venja okkum aftur við hitan og so eisini aftur til at bera vatn og brúka okkara egna generator til steym. Men gott var eisini at vera væl móttikin av næmingum, lærarum og grannum og at koma aftur higar, vit búgva. Eini onnur trúboðarahjún eru komin aftur til skúlan eftir lesnað í Bretlandi, og gott er at hava fleiri fólk við í arbeiðinum.



Bæði Kano og Nana síggja út til at klára hitan her væl. Kano dámar sera væl at spæla í sandinum og kemur inn aftur gravskitin fleiri ferðir um dagin. Sum tit kunnu ætlað, so fáa tær báðar nógvan ans og kanska onkuntíð ov nógvan, tí fólk vilja altíð bera tær, sjálvt um vit ikki kenna tey. Men tær síggja út til at takla tað bara heilt væl.

**Skúlin**

Vikuna eftir, vit komu, byrjaði skúlin aftur, men tann fyrsta dagin, eg skuldi undirvísa, møtti ongin næmingur upp. Summir vóru komnir til skúlan, men fingu ikki loyvi at fara í tíma, fyrrenn teir høvdu goldið skúlagjaldið. Tað sær út til, at hetta er ein afturvendandi trupulleiki, men táið vikan var úti, vóru teir flestu næmingarnir komnir aftur eftir vetrarsteðgin. Evnini, ið eg, Hallur, havi fingið at undirvísa í, eru bæði spennandi og avbjóðandi. Tey eru: Rómbrævið, Hirðabrøvini (Timoteus og Titus) og so tær skaldsligu bøkurnar í Gamla Testamenti (Sálmarnir, Job, Orðtøkini, Prædikarin og Hásongurin). Eitt, sum er serligt hesaferð, er, at tað eru teir somu næmingarnir, ið taka øll hesi skeiðini. Tí fái eg ein sera góðan møguleika at koma at kenna teir nærri og vónandi hava góða ávirkan.

**Ófriður**



Um tit fylgja við í tíðindunum, so hoyra tit ivaleyst javnan um Nigeria. Trupulleikin við víðgongdum muslimum veksur, og felagsskapurin Boku Haram ger alt meira um seg við at leypa á samkomur og statsbygningar í norðara partinum av landinum og í høvuðsstaðnum Abuja. Enn er sera friðarligt her, vit eru, men Boku Haram tykist at koma longri og longri suðureftir. Eftir fleiri álop eru nógv kristin flýdd úr norðara partinum, har muslimar eru í meiriluta. Onkuntíð koma eisini fyri hevndargerðir ímóti muslimum í syðra partinum, har kristin eru í meiriluta. Vandi er fyri, at hetta elvir til størri stríð millum kristin og muslimar, sum kanska eisini er ætlanin hjá hesum yvirgangsfelagsskapinum.

**Bønarevni**

Vinarliga biðið fyri okkum.

1) Takkið fyrst fyri, at Nana hevur tað gott og er væl fyri. Biðið framvegis um, at vit øll skulu vera trygg her og um verju frá sjúku, ferðslu og ráni.

2) Biðið um frið í landinum, og at friður skal framhaldandi valda í Ankpa.

3) Biðið fyri Halli. Fyri vísdómi at undirvísa, og at undirvísingin skal vera viðkomandi fyri næmingarnar.

4) Fyri skúlanum sum heild, serliga leiðsluni. Skúlin hevur javnan fíggjarligar trupulleikar.





Um Harrin leggur tykkum á hjarta at stuðla hesum verkinum, so ber til at seta pening á kontu 6460-4194464, sum er sett av til endamálið.